# Ferðandi Ferðaráð

**Ferðaráð Føroya er sum flytifuglur. Sjálvdan leingi á sama staði. Enn ein flyting stendur fyri durum, sum so verður tann fjórða í eini 10 ár**

FERÐAVINNUPRÁT
*Edvard Joensen*



*Heri Niclasen fegnast um, at tann fjóðra flytingini í eini tíggju ár helst verður endalig. Ferðaráðið fer ætlandi at flyta úr Vágsbotni eystur um aftur Tinganes í gamla pakkhúsið hjá Landshandlinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ferðaráðið hevur ikki støðast leingi á sama stað seinnu árini. Tað er stutt síðan, at flutt varð av Eystaru Vág vestur um, og nú eru útlit fyri, at flutt verður eysturaftur. Hesaferð í gamla pakkhúsið hjá Landshandlinum.

Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, sigur, at hendan komandi flytingin so verður tann fjóðra í bara eini tíggju ár. Tað er troyttandi fyri starvsfólkið, og ikki minst ørkymlandi fyri brúkaran, ikki at vita hvar skrivstovan er.

– Men nú er líkt til, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, fer at finna eina varandi loysn, greiðir Heri Niclasen frá.

Hann sigur, at Ferðaráðið vendi sær til landsstýrismannin við áheitan um at loysa hølisviðurskiftini, og tað gekk rættiliga skjótt, til loysnin við pakkhúsinum hjá Landshandlinum var á borðinum.

Í løtuni arbeiðir landsarkitekturin víðari við málinum, greiðir ferðavinnustjórin frá, og leggur afturat, at fólk í ferðavinnuni eru landsstýrismanninum takksom fyri hesa komandi loysnina.

## Trygt ferðamál

Føroyar eru trygt ferðamál, tykjast útlendsk ferðafólk at halda.

Tær ógvusligur hendingarnar í USA tann 11. september í fjør hava ikki ávirkað ferðavinnuna í Føroyum nakað, greiðir Heri Niclasen frá.

Nógva aðrastaðni hevur tað verið so, at fólk eru setst aftur av ferð, tí tey tora ikki eitt nú at flúgva av ótta fyri eini yvirgangsatsókn. Bæði í einum flogfari, men eisini á staðnum, tey ferðast til.

Føroyar liggja hinvegin so mikið langt burtur frá øllum hesum ófriðinum, at hendanveg aftrar fólk seg ikki við at koma.

Heldur kann tað tykjast øvugt, sigur Heri Niclasen, sum veit at siga frá gistingarhúsum, sum hava verið noydd at vísa fólki frá sær, tí ov lítið pláss er.

Gistingarmøguleikarnir eru avmarkaðir hjá okkum, og tað harmast ferðavinnustjórin um.

## Fótbóltur

Lutakastið, føroyingar fingu til komandi EM undankapping, hevur sett lív í ferðavinnukjakið í størri mun enn frammanundan.

Væntast kann, at rímiliga væl av fólki fer at koma hendanveg, bæði tá skotska og ikki minst týska fótbóltslandsliðið koma til Føroya at spæla.

Ferðaráðið hevur valt at fyrireika seg væl til hesar uppgávurnar, greiðir Heri Niclasen frá.

– Tað verður ikki bara fótbóltur og tað, sum til hann hoyrir, sum skal gera Føroyar kendar í hesum sambandi, sigur hann. Vit hava sett ein verkætlanarbólk, sum skal arbeiða við eini ætlan, sum lýsir allar partar av samfelagnum, fram til heystið 2003.

Tað kostar pening at gera slík átøk, og Ferðaráðið eigur ikki so nógvar pengar, at pláss er fyri eykatiltøkum. Fíggjarætlanin var longu løgd, áðrenn lutakastið hevði verið, so haðani verður ringt at finna nakað, sigur stjórin. Tí er ætlanin at søkja um eykajáttan til at gjøgnumføra verkætlanina fyri.

Gjørt fer at verða burtur úr at lýsa Føroyar í útlendskum fjølmiðlum. Eitt nú við sjónvarpsfilmi, sum ætlandi skal latast ymsum sjónvarpsstøðum at vísa, eins og ætlanin er í nógv størri mun enn fyrr at fáa útlendsk pressufólk hendanveg.

Samstarvað verður við vanligu samstarvspartarnar í føroysku ferðavinnuni, og skal verkætlanarbólkurin sita og samla træðrirnar, sum ferðavinnustjórin tekur til.

## Skelting

Tað hevur av og á verið víst á, at uppmerkingin í Føroyum er ikki nóg góð. Hetta hevur Ferðaráðið tikið til sín og er farið undir eina ætlan til tess at loysa hendan trupulleikan.

Tórálvur Weihe gjørdi her fyri eina verkætlan, sum gekk út upp á at merkja eitt nú gøtur og steðgipláss. Hetta gav so mikið gott úrslit, at avgjørt er at halda fram í sama sniði, greiðir Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, frá.

Arbeiðið, sum gerast skal í framtíðini, verður gjørt í tveimum stigum, soleiðis at øll ætlanin verður roknað at vera í trimum stigum. Tá er kanningin hjá Tórálvi Weihe roknað sum fyrsta stig.

Tað næsta, nú verður at gera í hesum sambandi, sigur Heri Niclasen, er at vitja kommunur, kunningarstovur og økisferðavinnufeløg at greiða teimum frá ætlanini.

Miðað verður ímóti, at kommunurnar so seta pening av yvir eitt áramál, so skeltingin kann gerast møgulig. Ferðavinnustjórin roknar við, at hetta kann gerast yvir eitt tíðarskeið upp á eini trý til fimm ár.

Triði partur er at fáa tað praktiska frá hondini. At seta skeltini upp, har tey skulu vera.

Tað verið seg alt frá wc-skeltum á bygningum til ferðsluskelti og navnaskelti ymsastaðni í haganum.

Ætlanin er, at hvør kommuna ella øki skal velja ein kontakpersón, sum skal hava beinleiðis samskiftið við Ferðaráðið undir hond.

## Gisting

Gisting í Føroyum er ein trupulleiki, ásannar stjórin á Feðaráðnum.

Ikki soleiðis at skilja, at tey støðini, har gistast kann, ikki lúka tær reglur og tey krøv, sett verða. Als ikki. Tí støðið er høgt.

Men tað er bara stutt og greitt ov lítið til av gistingarhúsum í landinum.

– Lutvíst er hetta ein sjálvskaptur trupulleiki, sigur Heri Niclasen. Hann kemst fyri ein part av, at vit eru vorðin ov røsk til at fáa fólk hendanveg.

Føroyska ferðavinnan er líkasum fangað í eini ringrás, greiðir hann frá. Vit gera fínar faldarar og hefti, sum vit senda út í heim. Fólk síggja og lesa. Gera av at koma hendanveg, og so hava vit ikki møguleika at hýsa teimum. Tað er keðiligt, ásannar ferðavinnustjóin.

Men hann skilir eisini støðuna hinumegin frá. Altso frá teimum, sum hava gistingarhúsini, men líkasum ikki seta seg føran fyri at byggja út. Tí tað er dýrt, og enn er ferðafólka talið ikki so javnt, at til ber at hava sama kapasitet í februar sum í juli.

– Tað verður tó arbeitt miðvíst við at menna ferðavinnuna uttan fyri háárstíðina, sigur Heri Niclasen. Ta sonevndu »off season turismuna«.

Tað er fyri ein part eisini eydnast, sæst millum annað á teimum fremmandu bilunum, um koyra í Føroyum bæði á vetri og vári.

– Bæði danskir og týskir bilar hava regluliga verið at sæð í ikki heilt »óbetýðiligum« tali seinnu tíðina, staðfestir Heri Niclasen. Tað er tekin um, at hetta arbeiðið er farið at bera frukt. Slíkt var heilt ókent fyri bara heilt fáum árum síðan.

Sama er galdandi fyri ferðafólk, sum koma loftvegis. Kappingin, sum verið hevur við kampagnuprísunum, hevur drigið væl av fólki hendanveg, hóast sjálvandi eisini nógv eru farin av landinum at ferðast.

Men alsamt verður arbeitt við at fáa fleiri feðafólk til Føroya. Og til at menna hesa ferðsluna, er Ferðaráðið farið undir eitt átak við sonevndum økisfaldarum.

Landið er býtt sundur í seks øki, sum hvør fær sín lokala faldara við upplýsingum um mangt og hvat, sum hoyrir økinum til, og sum økið hevur at bjóða.

Samskipa er soleiðis, at hesir økisfaldararnir, hóast teir eru serstakir, allir líkjast soleiðis, at eingin er í iva um, at her er ein økisfaldari.

– Ætlanin er at halda fram við hesum á hvørjum ári. Tað verða ymsu økini, ið sum frá líður fara at bera kostnaðin av hesum faldarum. Men fyrstu útgávuna hevur Ferðaráð Føroya fíggjað, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya.



UTTAN ÚR HEIMI

# Ísraelsmenn tikið leiðaran í felagsskapinum Fatah

**Ísraelskar trygdardeildir hava tikið Marwan Barghouthi, sum er leiðari í felagsskapinum Fatah hjá Yasser Arafat á Vestara Áarbakka. Vesturlendskir eygleiðarar ávara Ísrael.**



*Ísraelsmenn hava tikið Marwan Bharghouthi, men eygleiðarar ávara ísraelsmenn, tí Fatah-leiðarin er sera væl umtóktur millum palestinar*

*Reuters*

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Líka síðani ísraelski herurin fór undir átakið á Vestara Áarbakka tann 29. mars, hava hermenninir leitað eftir Marwan Bharghouthi. Ísraelsmenn vilja vera við, at hann stendur á odda fyri teimum víðgongdu Fatah-limunum, sum hava skipað fyri fleiri atsóknum ímóti ísraelsmonnum. Sambært ísraelsku myndugleikunum hevur Bharghouthi í fleiri førum givið boð um at søkja at ísraelsmonnum, og hann skal eisini hava rindað palestinum samsýning fyri atsóknirnar. Bharghouthi sjálvur hevur avsannað allar skuldsetingarnar ímóti sær.

Ísraelska blaðið Haaretz skrivaði í gjár, at servandir hermenn høvdu leitað eftir Marwan Bharghouthi í Ramallah, og at teir høvdu funnið hann í einari íbúð í býnum.

Jibri Rajoub, sum stendur á odda fyri einari av teimum palestinsku løgregludeildunum á Vestara Áarbakka, ávaraði í gjár ísraelsmenn ímóti at gera Bharghouthi mein. Hann vísti á, at tann tikni er limur í kollveltingarráðnum hjá Fatah og limur í palestinska lóggevandi tinginum.

Nakað undan ísraelska átakinum á Vestara Áarbakka tosaði ísraelska sjónvarpið við Marwan Bharghouthi, sum tosar flótandi hebraiskt. Tá segði Fatah-leiðarin, at ætlaðu ísraelsmenn at beina fyri sær, fór tað at kosta nógvum ísraelsmonnum lívið.

Vesturlendskir eygleiðarar í Ísrael siga, at handtøkan í Ramallah er uttan iva tann størsti sigurin hjá ísraelsmonnum, síðani herurin fór undir átakið fyri meiri enn fjúrtan døgum síðani. Men teir ávara samstundis ísraelsmenn. Marwan Bharghouthi er sera væl umtóktur millum palestinar, og seinastu árini hevur hann verið mettur sum møguligur eftirmaður hjá Yasser Arafat. Tí eiga ísraelsmenn at vera varnir, siga eygleiðararnir.

# Pávin í hernað ímóti pedofilum prestum

**Pávin hevur boðsent amerikanskum kardinalum og kirkjuleiðarum til fundar í Rom, eftir at fleiri mál sum óskikkiligar prestar hava skakað katólsku kirkjuna í USA**

*Árni Joensen*

Embætismenn í Vatikaninum upplýstu í gjár, at pávin hevur sent boð eftir trettan amerikanskum kardinalum og kirkjuleiðarum, so teir kunnu greiða frá teimum nógvu málunum um pedofilar prestar, sum seinastu tíðina eru vorðnir avdúkaðir í USA. Lítið hevur verið at frætta úr Vatikaninum fyrr enn nú, sjálvt um avdúkingarnar hava skakað ta katólsku kirkjuna í USA. Herfyri valdi pávin kortini at fordøma teir óskikkiligu prestarnar.

Serliga býurin Boston er meint raktur av avdúkingum, og kardinalurin Bernard Law er lagdur undir at hava dult tað, sum prestar hansara tókust við. Skriðan leyp, tá tað kom fram, at fyrrverandi Boston-presturin John Geoghan hevði gjørt seg inn á meiri enn 130 børn seinastu 30 árini.

Síðani hava myndugleikarnir avdúkað fleiri prestar í býunum New York, Philadelphia, St. Louis og Detroit og í statinum Kalifornia. Higartil eru umleið 3.000 katólskir prestar í USA skuldsettir fyri at hava gjørt seg kynsliga inn á børn.

Búskapur og vinna:

## Álit á russum

Grunnurin, sum tryggjar danskar fyritøkur ímóti tapi, tá tær útflyta vørur til Russlands, hevur fingið betri álit á russisku keyparunum. Tí hevur grunnurin nú gjørt av at lækka gjaldið, sum donsku fyritøkurnar skulu gjalda fyri trygdina.

Í 1999 og 2000 minkaði danski útflutningurin til Russlands, men síðani er hann vaksin aftur og liggur nú um fimm mia. krónur. Donsku fyritøkurnar vænta sær nógv av tí veksandi russiska marknaðinum, og tær fegnast tí um avgerðina hjá trygdargrunninum.

Leiðslan í trygdargrunninum sigur, at tann russiski búskapurin er í støðugari menning, og at tey fyrstu nýskipanartiltøkini hjá Putin forseta eru farin at geva úrslit.

## Stórt avlop

Noreg hevði stórt avlop í samhandlinum við umheimin tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár. Norðmenn útfluttu í tíðarskeiðinum vørur fyri 44 mia. norskar krónur, meðan innflutningurin var 21,2 mia. krónur. Avlopið var sostatt 22,8 mia. krónur, sum var 5,1 mia. krónur meiri enn í fyrsta ársfjórðingi í fjør. Av teimum 44 mia. krónunum, sum norðmenn útfluttu fyri í fyrsta ársfjórðingi, stavaðu 27,7 mia. krónur frá olju og gassi og. Fiskur og fiskavørur góvu 2,4 mia. krónur.

## Íløgur í íbúðir

Í Danmark er gravgangur eftir frítíðaríbúðum í løtuni, og serliga tær íbúðirnar, sum eru fram við strondini, hava stóran áhuga. Sølufelagið Torben Kjeldsen hevur selt 500 frítíðaríbúðir hetta seinasta árið, og eitt annað felag sigur seg hava selt 115 íbúðir. Tær flestu eru í Vesturjútlandi. Vanliga mannagongdin við tílíkum íbúðum er, at eigarin tryggjar sær rætt til at nýta íbúðina fimm vikur um árið, og at hon síðani verður leigað øðrum hin partin av árinum. Tað ber í sær, at tey flestu, sum keypa tílíkar frítíðaríbúðir, fáa væl burtur úr íløguni.

Úr Norðurlondum:

## Smugla meiri rúsevni

Alt meiri og meiri rúsevni verður smuglað til Noregs, og tað hevur fingið politikararnar at heita á tollverkið um at betra marknaeftirlitið.

Higartil í ár hevur norska tollverkið lagt hald á 30.000 ecstasytablettir. Sama tíðarskeið í fjør funnu tollararnir bara 115 tablettir av hesum slagnum. Samstundis vísa tølini, at tollararnir javnan koma fram á munandi størri nøgdir av rúsevnum nú enn fyrr.

Leiðslan í tollverkinum sigur, at hon fer at leggja uppaftur størri dent á at fyribyrgja smugling, og at eftirlitið á markinum verður styrkt.

## Serligt ákæruvald

Danska stjórnin hevur gjørt av at skipa eitt serligt ákæruvald, sum skal taka sær av málum, sum viðvíkja krígsbrotsverkum og brotsverkum ímóti mannaættini, og sum skal tryggja, at mál av hesum slagnum fáa eina skjótari avgreiðslu enn nú.

Tað nýggja ákæruvaldið skal bara kanna mál, sum eru framd uttanlands, og sum viðvíkja útlendingum, sum búgva í Danmark. Upprunin til avgerðina hjá stjórnini er eitt mál um ein fyrrverandi irakskan general, sum býr í Sorø, og sum kurdar leggja undir at hava skipað fyri einum eiturálopi á kurdarnar í Norðurirak í nítiárunum.

Lene Espersen, løgmálaráðharri sigur, at krígsbrotsmenn skulu ikki finna skjól í Danmark, men at skuldsetingar ímóti teimum skulu kannast, og at teir skulu rættarsøkjast, er grundarlag fyri tí.

## Í fyrra lagi

Tey flestu munnu halda, at skattaverkið roynir at fáa fatur á teimum pengum, sum tað yvirhøvur kann fáa fatur á. Í Noregi fór skattavaldið í so langt nú um dagarnar, tá ein tíggju mánaðar gamal drongur fekk senda sjálvuppgávu fyri árið í fjør. Skattavaldið hevur lovað, at drongurin fær ikki sjálvuppgávu næsta ár.